Vit trú›u allir upp á hetta

Eftir at seinasti dysturin á árinum var leiktur, hittu vit ein av Herfølge-leikarunum, Kenneth Kastrup

Jákup Mørk/
Álvur Haraldsen
úr Herfølge

Ein av teimum leikarum, sum veruliga hevur gjørt um seg á Herfølge li›num hetta kappingarári› er lítli, men kviki, Kenneth Kastrup.

Eftir dystin hittu vit arbei›ssama mi›vallaran, og spurdu vit hann beinanvegin, hvussu kenslurnar vóru, nú teir at enda gjørdust danskir meistarar í fótbólti.

- Hetta er heilt ótrúligt. Ja, nærum óveruligt, tí eingin hev›i rokna› vi› okkum, tá kappingarári› byrja›i, og flestu serfrø›ingarnir spáddu, at vit fóru at teljast millum ni›urflytingarevnini, seg›i ein gla›ur Kastrup.

Høvdu ikki gummibein

Tá Herfølge fyri viku sí›ani blaka›u sigurin móti OB fyri bor›, og máttu taka til takkar vi› javneliki, eftir at hava veri› á odda vi› tveimum málum, vóru fjølmi›larnir á einum máli um, at nú høvdu leikararnir fingi› sonevnd gummibein.

Hesum er Kenneth Kastrup tó als ikki samdur í. – Ta› var jú ongantí› solei›is, at vit ikki tordu at spæla fótbólt, men júst í hasum dystinum vóru fleiri lutir, sum vi›førdu, at vit mistu eina annars trygga lei›slu.

Harumframt heldur hann, at at stemningurin í hópinum alla tí›ina hevur veri› heilt ótrúliga gó›ur, og at hetta hevur veri› vi› til at bori› li›i› fram. – Vit hava havt eitt ótrúliga gott samanhald, og hetta hevur vi›ført, at vit allir alla tí›ina hava toga› sama veg, fyri at røkka stóra máli okkara.

Ver›ur burtur

Máli› er nú rokki›, og tí spurdu vit Kenneth, um teir høvdu hugsa› naka› ví›ari enn til dagin í dag.

- Kanska havi eg eina framtí› á TV3-sendingini, Efterlyst, helt hann skemtiliga fyri. – Í øllum førum ætli eg mær at vera burturstaddur komandi dagarnar, solei›is at eg rættuliga kann halda meistaraheiti›,

Hvat tí›in hevur at bjó›a eftir hetta veit Kastrup ikki rættuliga, men einki er at ivast í, at felag hansara gongur einari spennandi tí› á møti, men alt hetta er ikki rættuliga sorna› enn. – Champions League og anna› hava vit slettis ikki tosa› um enn, men lat okkum nú bara fyrst njóta løtuna, seg›i ein gla›ur leikari at enda.

Kenneth Kastrup fegna›ist eftir dystin sunnudagin

Fagna›i versoninum

Verpápi Jákup Mikkelsen var eisini millum ásko›ararnar á Herfølge Stadion

Jákup Mørk/
Álvur Haraldsen

Sannur fótbóltsfepur hevur herja› í Klaksvíkini seinastu dagarnar, og hetta hevur vi›ført, at ein lítil koloni av klaksvíkingum var at síggja í Herfølge sunnudagin.

Millum mongu klaksvíkingarnar hittu vit eisini Jóannes Niclasen, sum er pápi at Eilen, konuni hjá landsli›smálverjanum.

Hann grei›ir frá,at nú hann og gentan skuldu at fer›ast, hev›i hann sjálvandi fingi› lagt alt solei›is til rættist, at hann samstundis kundi fáa seinasta dystin hjá Jákupi og teimum vi›, á›renn lei›in var› løgd longur su›ureftir.

Partur av 66'li›num

Jóannes man ikki vera heilt ókunnugur vi› spæli› vi› hvítu le›urkúluni. Upp ígjøgnum fimtiárini var hann partur av einum sera evnaríkum ungdómsli›i hjá KÍ, sum vann so at sgia alt, sum kundi vinnast.

Flestu av li›feløgunum vóru seinni partar av sonevnda 66'num, me›an Jóannes sjálvur var farin at sigla. Hetta tóktist tó ikki nerva ta› heilt stóra. Ísta›in fyri at sigla, hevur hann kortini fylgt væl vi› alla tí›ina, og ta› var ikki sørt av stoltleika í røddini, tá hann greiddi frá, hvussu stuttligt ta› var hjá leikarunum hóskvøldi›, tá meistaraskapurin var› fingin til høldar.

Verfa›irin hjá Jákup Mikkelsen

Vann 40.000 kr.

At Herølfe gjørdist meistarar, kom sera óvart vi› hjá teimum flestu, írokna› donsku tipstænastuni

Jákup Mørk/
Álvur Haraldsen
úr Herfølge

Vi› kappingarársbyrjan, lat tipstænastan nevnliga peningin aftir 40 fer›ir, um tú tá hev›i sagt, at Herfølge skuldi gerast meistarar.

Hetta lat Martin Møller úr Køge sær ikki siga tvær fer›ir. Til stuttleikar setti hann 500 kr. á Herfølge, og hetta skuldi so vísa seg at gerast ein sera gó› íløga, tí nú kappingin er li›ug, ver›ur afturgjaldingin sostatt 40.000 kr.

Vann líkamiki›

Martin grei›ir frá, at hann heldur vi› Brøndby, so seinastu dystirnar vóru nervarnir ikki so nógvir, tí líkamiki› hvat gjørsliti› gjørdist, so vann hann onkursvegna.

Tá hann keypti se›ilin hev›i hann til stuttleikar veri› inni í skiftirúminum hjá Herfølge, og hóst ta› tóktist sear ósannlíkt, so fekk hann kortini bo›i› tr‡ túsund krónur fyri se›ilin, men seg›i kortini nei takk.

Júst, hvat pengarnir skulu n‡tast til, veit hann ikki, men hann rokna›i tó kortini vi›, at vinirnar kravdu, at hann skuldi gjalda okkurt á fer›ini í kvøld.

Fekk eina tribunu

Gert Nodin gevst nú sum yrkisleikari, eftir at hann seinastu 11 árini hevur leikt vi› Herfølge

Jákup Mørk/
Álvur Haraldsen
úr Herfølge

Hóast ta› einamest var gle›i og gaman, sum stó› á skránni, tá Herfølge leikararnir sunnukvøldi› vór›u fagna›ir, so vóru eisini onkrar heldur hugtungar løtur.

Ein av hesum var, tá Gert Nodin tók mikrofonina og takka›i fyri seg eftir 11 ár í felagnum.

Misti bronsuna

Hóast hann hevur veri› nógv skaddur hetta ári›, og tískil sjáldan hevur veri› millum teir fyrstu 11 hjá Faxe, so hev›i venjarin lova› honum at byrja inni í dystinum móti FCK, og stutt undan leikloki var› hann so skiftur út, me›an ásko›ararnir standandi takka›u honum fyri trúgva tænastu.

Eftir dystin fingu vit or› á veteranin, sum at kalla var í sjeynda himni. Hann sigur seg ongantí› hava rokna› vi›, at ta› fór at eydnast honum at vinna eitt danskt meistaraheiti›.

- Fyri trimum árum sí›ani var› eg sn‡ttur fyri bronsumerkini (máli› um spæliloyvi› hjá Jákupi Mikkelsen), og so rokna›i eg vi› at ta› var ta›, seg›i Nodin eftir dystin.

Ví›ari seg›i hann, at hetta mátti vera á lei› tann perfekti hátturin at enda yrkislei› sína, nú hann í meira enn eitt tíggjuáraskei› hevur virka› sum yrkisleikari. At fáa lovi frá venjaranum at byrja inni, so hann kundi siga ásko›arunum farvæl.

Dagurin gjørdist ikki minni gó›ur av, at Gert Nodin sunnumorgunin hev›i veri› vi› til at doypt n‡ggju tribununa á Herfølge Stadion, og navni› á hesari var› »Gert Nodin Tribunen«. – Hetta er bara naka›, sum man hevur lisi› um, tá stórir og kendir spælarar fáa eina tøkk fyri trúgva tænastu, og at hetta skuldi henda mær, er bara heilt ótrúligt.

Kunnu altí› vitja

Nú hann gevst sum yrkisleikar, skal Nodin komandi tí›ina royna seg sum handilsmann, og undir veitsluni fekk hetta fleiri av li›føgunum at rópa, at teir skuldu hava 50% avsláttur í framtí›ini.

Í takkarrø›uni sínari seg›i veteranurin, at hasi 50 prosentini kundu li›felagarnir gloyma alt um, men at teir kortini skuldu ver›a vælkomnir yvir á tribununa at vitja seg.

Gert Nodin takka›i fyri seg, eftir 11 ár í felagnum

Málmansvenjarin gevst

Ikki eitt eyga var turt, tá Kai Larsen takka›i fyri seg, eftir drúgva tænastu í felagnum

Jákup Mørk

Tá Jákup Mikkelsen fyri nøkrum árum sí›ani kom til Herfølge, var einki at ivast í, hvør átti fremsta plássi› millum stengurnar.

Ma›urin vi› eitt-talinum var tá Kai Larsen, men so vi› og vi› gjørdist kappingin frá n‡ggja føroyska leikaranum alsamt har›ari.

Eftir at hann var› skaddur somiki› álvarsliga, at yrkislei›in var› ste›ga›, hevur Kai Larsen virka› sum málmansvenjari hjá Jákupi, men nú sáttmálli hansara gongur út, er eisini hetta starv li›ugt.

Kai var tó sjálvandi eisini at síggja á gullveitsluni, har hann sum seinasti leikari fekk mikrofonina í hondina, at siga nøkur or›.

Ikki var ta› tó ta› nógva, sum kom út um varrar hansara, men á øllum brøgdum skiltist, at hann var sera fegin um tí›ina, sum hann hev›i havt felagnum.

Eftir rø›una var› fari› beint oman at siga Jákupi farvæl.

Føroyingarnir á Herfølge Stadion vóru ikki ringir at fáa eyga á. Til høgru sæst Jan Hugo Gardar, sum tey flestu kenna frá sjónleikinum "seks í pyamasi"